Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	29.09.2023
Mál nr.:	23/18453
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22.09.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Barnafrádráttur til sendifólk og umskipaður pensjónistafrádrátttur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 10. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "tilhald í Føroyum" sett: "ella hevur tilhald uttanlands sum sendifólk".

2. § 3, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein frádrátt á upp til 6.000 kr. um árið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Pensjónistafrádrátturin

Landsstýrið hevur avgjørt, at námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heilsuhjálparar við og uttan útbúgving skulu hava eitt lønarlyft frá 1. januar 2024.

Nógv størsti parturin av hesum bólkum eru í starvi á kommunala økinum.

Sum endurgjald fyri kostnaðin av lønarlyftinum hjá kommununum verður gjørd ein broyting í fíggingini av skattafrádráttinum hjá pensjónistum. Tøka inntøkan hjá pensjónistunum verður óbroytt.

Hesin fíggingarleistur fylgir vaksandi talinum av pensjónistum og ger sostatt, at samsvar er millum fígging og fíggingartørv.

Lønarlyftið varð mett at kosta 47 mió. kr. brutto fyri allan almenna geiran. Lønarlyftið fær virknað frá 1. januar 2024.

Hjá kommunum starvast áleið 75% av starvsfólkunum, sum fáa lønarlyft. Lønarlyftið kostar tískil kommunum umleið 35 mió. kr. brutto. Kommunurnar fáa 20% í inntøkuskatti frá øllum lønarlyftinum, og er kommunuskatturin sostatt umleið 9 mió. kr. Lønarlyftið kostar kommununum 26 mió. kr. netto, sum tær fáa í inntøku av hesum uppskoti.

Uppskotið er partur av avtalu við Kommunufelagið, sum orsakað av lønarlyftinum til námsfrøðingar, heilsuhjálparar og heilsurøktarar fær øktar nettoútreiðslur á 26 mió. kr.

Við hesum uppskoti verða kommunurnar hildnar skaðaleysar av lønarlyftinum.

Sendifólk

Í apríl 2017 varð skattalógin broytt soleiðis, at sendifólk Føroya fóru frá at vera skattskyldug í Danmark til at vera skattskyldug í Føroyum, sbr. løgtingslóg nr. 42 frá 10. apríl 2017 og løgtingsmál nr. 58/2016.

Eitt endamál við hesi broyting var at tryggja, at skatturin av lønum til sendifólk fellur til landskassan og ikki danska ríkiskassan. Ætlanin við broytingini var ikki, at inntøkuviðurskiftini hjá sendifólkum annars skuldu broytast.

Skattamyndugleikarnir meta ikki, at heimild er í skattalógini til at veita sendifólkum barnafrádrátt, tí hesi ikki hava tilhald í Føroyum, og er henda tulking staðfest í skattakærunevndini.

Fyri at fáa hesa heimild upp á pláss er neyðugt at broyta ásetingarlógina.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu hava sendifólk ikki rætt til barnafrádrátt grundað á, at hesi hava tilhald uttanlands. Pensjónistafrádrátturin verður sambært galdandi lóggávu býttur millum land og kommunur.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at javnseta sendifólk, sum eru fult skattskyldug í Føroyum, við skattgjaldarar, sum hava tilhald í Føroyum. Harafturat er endamálið at nýta broyttu fíggingina av pensjónistafrádráttinum til at viga upp ímóti kostnaðinum fyri kommunurnar av lønarlyftinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verða sendifólk javnsett við skattgjaldarar, sum hava tilhald í Føroyum, og kommunurnar fáa endurgjald fyri økta kostnaðin, sum lønaryftið hevur við sær.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring, men er gjørt í samráð og eftir avtalu við kommunufelagið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið (sendifólk). Broytingarnar í lógini hava ikki ávirkan á onnur, og tískil er ikki mett neyðugt at senda uppskotið til almenna hoyring.

Sí fylgiskjal 2.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Til broyting 1:

Broytingin hevur við sær, at sendifólk Føroya uttanlands eisini fáa barnafrádrátt. Talan er um eina tekniska broyting og roknað verður ikki við, at hon fer at hava stórvegis kostnað við sær.

Til broyting 2:

Við uppskotinum letur landið allan frádráttin til pensjónistar, sum áður var 3.000 kr. í landsskattinum og 3.000 kr. í kommunuskattinum. Talið av pensjónistum í 2023 er um 8.700, og tí verður kostnaðurin av uppskotinum fyri landið mettur til 26 mió. kr. í 2024. Árini frameftir væntast talið av pensjónistum at økjast, og við hesum økist kostnaðurin av frádráttinum samsvarandi. Framrokningar vísa, at í 2030 er talið økt til 9.623, hóast pensjónsaldurin er vorðin hækkaður til 68 ár, og fer frádrátturin tá at kosta landskassanum samanlagt 57,7 mió. kr.

	2023	**2030**	**2040**
Tal av pensjónistum	8.700	9.623	11.643
Frádráttur (kommunur)	26.100.000	28.869.000	34.929.000
Frádráttur (land)	26.100.000	28.869.000	34.929.000
Tilsamans	**52.200.000**	**57.738.000**	**69.858.000**

Uppskotið er partur av avtalu við Kommunufelagið, sum orsakað av lønarlyftinum til námsfrøðingar, heilsuhjálparar og heilsurøktarar fær øktar nettoútreiðslur á 26 mió. kr.

Við hesum uppskoti verða kommunurnar hildnar skaðaleysar av lønarlyftinum.

Til at fíggja allan frádráttin, sum landið letur, verður virðisgjald á 45% lagt á el-bilar við CIF-virði omanfyri 200.000 kr. Roknað verður við, at hetta gevur 25 mió. kr. í 2024, men hendan inntøkan minkar stigvíst fram til 2028.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at lógaruppskotið kemur at hava stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri sendifólk Føroya.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við:

1) **Hoyvíkssáttmálan**

2) **Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar, og lógaruppskotið elvir ikki til nýggjar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Sambært galdandi áseting hava sendifólk Føroya ikki rætt til barnafrádrátt, hóast tey eru fult skattskyldug í Føroyum.

Við uppskotinum verða sendifólk Føroya javnsett við persónar, sum hava tilhald í Føroyum.

Nr. 2
Sambært galdandi áseting er pensjónistafrádrátturin upp til 3.000 kr. í landsskattinum og upp til 3.000 kr. í kommunuskattinum.

Við uppskotinum verður tað bert landið, sum letur allan pensjónistafrádráttin.

Pensjónistafrádrátturin verður sostatt frameftir upp til 6.000 kr. í landsskattinum.

Fyri pensjónistin er broytingin neutral.

Til § 2

Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 29. september 2023

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá Kommunufelagnum